Tíðindaskriv frá Tjóðveldisflokkinum:

## Suðuroyggin ikki sleppast upp á fjall

**Høgni Hoydal**
*floksformaður*
*Vegna tjóðveldisflokkin*



Tað er nú almannakunngjørt, at oljufeløgini av sínum eintingum hava avskrivað Suðuroynna sum oljuútgerðarhavn – ella rættari tað felag, sum hevur ætlað at havt sítt virksemi á Drelnesi.

Hetta gongur beint ímóti teimum politisku samtyktum, sum eru gjørdar um oljuvirksemið og beint ímóti tí, sum løgtingið hevur álagt landsstýrismanninum í oljumálum at gera í útbjóðingarlógini.

Ongin ivi er um, at nógv virksemi verður undir øllum umstøðum í miðstaðarøkinum. Tí var neyðugt politiskt at áseta, at virksemi skal vera í útjaðaranum, og tað samtykti løgtingið.

Oljufeløgini skulu leggja ein ætlan fyri landsstýrismannin og ein frágreiðing latast tinginum. Landsstýrismaðurin má tí geva oljufeløgunum greið boð um, at uttan mun til, hvat útgerðarfelag, tey professionelt halda vera tað besta, so skal virksemi av hesum vera í Suðuroynni.

Hetta málið verður tikið upp á samgongufundi.

# Eingin oljuútgerðarhavn í Suðuroynni

**Oljufeløgini, sum fara at leita eftir olju við Føroyar, hava gjørt av at geva trimum samtøkum loyvi at bjóða uppá útgerðarvirksemið. Hesi samtøk koma at arbeiða út frá Havnini og Rúnavík. Drelnes er útilokað.**

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Tað verður eingin útgerðarhavn í Suðuroynni, um tað verður upp til oljuvinnuna at avgera hetta. Serfrøðingar í útgerðarvirksemi hjá Statoil hava gjørt av, saman við umboðum fyri øll feløgini, sum hava leitingarloyvi, at trý av teimum seks samtøkunum, sum vóru við í prekvalifiseringini undan sjálvari útbjóðingini sleppa at bjóða. Tey eru Asco Føroyar saman við Strandfaraskipum Landsins, Skipafelagið saman við Atlantic Supply Base í Runavík og Eimskip saman við SBS, sum er ein skotsk fyritøka, ið m.a. rekur eina útgerðarstøð í Hetlandi. Eimskip kann arbeiða bæði frá Runavík og Havnini.

Sum tað sær út til, so eru bæði Drelnes og Sund nú slept. Tað ljóðar, at Asco Føroyar herfyri gjørdi av at sleppa ætlanum sínum á Sundi og heldur leggja seg eftir at fáa virksemi í Havn.

Hetta merkir, at Norserv, sum hevur ætlað sær at fáa oljuútgerðarhavn á Drelnesi, als ikki sleppur at bjóða. Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil sigur, at Norserv og Smyril Line, sum var saman við einum útlendskum felag, hava ikki fingið nóg nógv stig til at kvalifisera seg víðari til sjálva útbjóðingina. Rúni Hansen sigur, at avgerðin, sum er tikin er, eina og aleina er út frá professionellum fakligum metingum. Teir hava valt ikki at leggja aðrar metingar við. Við hesum sipar hann til ynski hjá tinginum at síggja til, at partur av útgerðarvirkseminum verður í útjaðaranum.



*Modellmynd av útgerðarhavnini á Drelnesi, sum kanska ikki verður til nakað álíkavæl*

Oljufeløgini hava annars gjørt av, at alt, sum hevur verið oljuverju at gera, skal vera í Suðuroynni, tvs. goymsla av oljuverju ol. Hetta mugu feløgini, sum nú sleppa at bjóða, taka hædd fyri.

Útbjóðingingartilfarið skal latast inn 26. januar. Avgerðin, hvør fær útgerðarvirksemið, verður tikin áðrenn 1. mars.

### Ljóðar løgið

Tá oljulógin varð til viðgerðar á tingi varð samtykt ein lógargrein, sum sigur, at útjaðarin skal eisini takast við í myndina, tá talan verður um útgerðarvirksemi.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at hann og landsstýrið hava einki við prekvalifiseringina at gera. Tað varð latið upp til vinnuna at taka sær av hesum. Hann kennir enn ikki allar smálutir í málinum, men heldur tað ljóðar løgið, at eitt felag sum Norserv, sum m.a. hevur donsku útgerðarhavnina í Esbjerg við sínum drúgvu royndum aftanfyri seg, als ikki skal hava klárað at kvalifiserað seg.

---

Suðuroyartingmenn harmast avgerðina um útgerðarhavn:

# Løgtingið gjørdi brølaran

**- Stóri brølarin var, at løgtingið ikki gjørdi av, at útgerðarhavnin skuldi verða í Suðuroy, heldur Henrik Old. Flemming Mikkelsen vónar, at Suðuroyggin kann fáa ein leiklut í oljuvinnuni sum frálíðir**

ÚTGERÐARHAVN
*Eyðun Klakstein*





*Suðuroyartingmenn harmast avgerðina um, at Suðuroyggin ikki sleppur at bjóða upp á komandi útgerðarhavnina*

Suðuroyartingmenn harmast avgerðina hjá oljufeløgunum um, at ein komandi útgerðarhavn skal vera í Havn ella á Skálafjørðinum og ikki í Suðuroy.

– Tað undrar meg stórliga, at Suðuroyggin ikki so frætt sum sleppur at bjóða upp á útgerðarhavnina, sigur Henrik Old, sum er tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

– Hetta er ein keðilig støða, men soleiðis kann tað enda, tá tú telvar við teimum stóru, heldur Flemming Mikkelsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin.

### Brølarin

Fyri einum lítlum ári síðani legði Javnaðarflokkurin uppskot fyri ting um, at tingið skuldi avgera, at ein komandi útgerðarhavn skuldi verða í Suðuroynni, men hetta uppskot var felt av einum meiriluta í tinginum.

– Stóri brølarin var, at løgtingið ikki gjørdi av, at útgerðarhavnin skuldi verða í Suðuroy. Men meirilutin í tinginum vildi ikki taka hesa avgerðina, og so var tað væntandi, hvat fór at henda, tá avgerðin var latin upp í hendurnar á oljufeløgunum, heldur Henrik Old.

– Tá løgtingið feldi uppskotið var tað fagnaður millum umboðini fyri útgerðarhavnir og oljufeløg á áskoðaraplássunum, og tað gav ábendingar um, hvat ætlanin var.

### Koma við seinni

Flemming Mikkelsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, vónar, at Suðuroyggin sum frálíðir kann sleppa rættiliga upp í oljuvinnuna.

– Hetta er vónandi bara fyrsta stigið í eini komandi oljuvinnu, og tí mugu vit vóna, at Suðuroyggin kann fáa ein leiklut í oljuvinnuni seinni, heldur hann.

– Eg havi bitið merki í, at Suðuroyggin als ikki sleppur at bjóða upp á útgerðarhavnina, og tað meti eg verða undarligt, tí tað er gott og virt felag, sum er hugað at verða við í útgerðarhavnini á Drelnesi.

Flemming Mikkelsen heldur, at um ein politisk avgerð skuldi verið tikin um, hvar útgerðarhavnin skuldi liggja, hevði løgtingið verið rætta høpi at gjørt tað í.

– Men tað var lagt upp til, at oljuvinnan sjálv skuldi avgera hetta, og so kann tað ganga soleiðis, heldur hann.

### Havnin fær trupulleikar

Henrik Old heldur, at líka so nógv sum avgerðin er ein vanlukka fyri Suðuroyggina, kann tað gerast ein vanlukka fyri miðstaðarøkið.

– Vit vita sum er, at tað er trupult at finna innivist til fólk, virki og feløg í Havn, og um útgerðarhavnin skal leggjast í høvuðsstaðnum fer hetta bara at økja trýstið á býin, og tað kann fáa óhepnar avleiðingar, heldur Henrik Old.

– Seinastu mánaðirnar eru fleiri nýggjar oljuskrivstovur lætnar upp í Havn, so tað liggur kanska í kortunum, at tað er her, at útgerðarhavnin skal vera.

Feløgini, sum eru sinnað at gera útgerðarhavn í Havn ella á Skálafjørðinum, sleppa nú at geva tilboð til oljufeløgini, og síðani verður endaliga avgerðin tikin um, hvar útgerðarhavnin verður.

Eitt er tó longu avgjørt, hon verður ikki í Suðuroy.